## Sangur á Sandi

Leygarkvøldið 4. november klokkan 19.30 verður eitt hugnakvøld við sangi í Virkinum á Sandi. Tá er ætlanin at syngja gamlar og nýggjar sangir, sum eru yrktir til Sands bygd ella Sandoynna, ella sum hana samband við oynna. Fyrireikararnir vilja fegnir hava fatur á honum ella henni, sum hevur onkran sang, sum teir ikki hava fingið fatur á enn til tiltakið. Aftan á hugnakvøldið verður dansur við nýggja dansibólkinum Sand Dansband.

## Letur upp 1. juli

Arbeiðið at gera tunnilin millum Øravík og Hov gongur so nógv betur enn væntað, at hann væntandi verður liðugur væl fyrr enn upprunaliga mett. Ætlandi verður skotið ígjøgnum um hálvan annan mánað, og so verður roknað við, at tunnilin letur upp fyri almennari ferðslu tann 1. juli næsta ár. Tað er fimm mánaðir fyrr enn ætlað. Tað hava bert verið einstakir smáir trupulleikar inni í fjallinum. Tað er Ístak, sum ger tunnilin.

# Faroexpo verður uppaftur størri komandi ár




*Um morgnarnar var góður morgunmatur at fáa í Ítróttarhøllini, og um middagsleitið var døgurði. Brøðurnir, Búgvi og Pól Esber úr Skálafirði, undirhildu við guitara og góðum sangi undir døgurðaborðinum mikudagin*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Altjóða vinnustevnan Faroexpo, sum hevur verið hildin í Runavík við fundarvirksemi og í Kelduni í Skálafirði við fyrilestrum, er nú av á hesum sinni**

FAROEXPO 06
*Vilmund Jacobsen*

- Eg haldi, at alt hevur gingið væl á Faroexpo. Flestu fyritøkurnar hava havt fleiri fundir við aðrar fyritøkur, og tær flestu munnu hava havt einar 10-15 fundir tilsamans.

Tað sigur Símun Hammer, leiðari á Virkisráðgevingini, sum nú á øðrum sinni hevur samskipað Faroexpo-tiltakið.

### 42 fyritøkur

Í dag er vinnustevnan liðug í Ítróttarhøllini í Runavík, og onkur av fyritøkunum, sum hava verið við, eru farnar á virkisvitjan.

- Talið av fyritøkum, sum vóru við, var 42, harav 18 vóru útlendskar, serliga danskar, úr baltisku londunum og Grønlandi.

Símun sigur, at tríggjar fyritøkur, sum partvís eru íslendskar, vóru úr Baltikum, og somuleiðis var Royal Greenland við úr Grønlandi.

- Onkur av fyritøkunum hava eisini umboðað fleiri aðrar, eitt nú eitt danskt konsortium, sum hevur 18 fyritøkur undir sínum hatti.

Á reiðarabásinum og alibásinum vóru sjey fyritøkur tilsamans, fimm reiðaríir og tvær alifyritøkur.

Reiðaríini vóru Vinna, Snaraløkur, Framherji, Thor og Supply-Service, sum er felagið í Leirvík, ið byggir supply-skip.

Á alibásinum vóru Havsbrún og Bakkafrost.

### Uppaftur størri

- Hetta er annað árið á rað, at Faroexpo verður hildin, og vit ætla okkum eisini at skipa fyri vinnustevnuni komandi ár. Síðan verður støða tikin til, um Faroexpo frameftir verður hvørt ár – ella annaðhvørt ár.

Símun Hammer vísir á, at fyrireikararnir hava lært nakað av hesum báðum stevnunum.

- Vit hava fingið at vitað, hvat ymisku fyritøkurnar, sum eru við, ynskja sær og eitt, sum vit ætla okkum at gera meira við til komandi ár, er at fáa uppaftur fleiri fyritøkur við.

Hann heldur ikki, at talið av fyritøkum neyðturviliga er so avgerandi, men sigur kortini, at tað hevði tænt vinnustevnuni, um útboðið var uppaftur størri.

- Tað er eisini stuttligari og uppaftur meira áhugavert at vera í stevnuumhvørvinum í Ítróttarhøllini, tá ið talið av fyritøkum er stórt.



*– Vit hava fingið at vitað, hvat ymisku fyritøkurnar, sum eru við, ynskja sær og eitt, sum vit ætla okkum at gera meira við til komandi ár, er at fáa uppaftur fleiri fyritøkur við, so útboðið verður enn størri, sigur Símun Hammer, samskipari*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Símun vísir eisini á, at eru fleiri fyritøkur við, sum hava eitt uppaftur størri útboð, kann tað geva ringvirkningar soleiðis, at enn fleiri hava hug at verða við.

### Fundir avtalaðir

- Skipanin hevur verið hon, at flestu fundirnir, sum fyritøkurnar hava við hvørja aðra, vóru avtalaðir longu, áðrenn vinnustevnan byrjaði.

Hann sigur, at Virkisráðgevingin hevur tikið sær av at samskipa fundarvirksemið.

- Fyritøkurnar hava latið okkum vitað, hvønn tey ynskja at hava fundir við, og síðan hava vit syrgt fyri, at alt passar saman. Í øðrum førum eru fundir avtalaðir á sjálvari stevnuni, og tá skulu hesir so fáast at passa inn í fundarskránna, sigur Símun Hammer, leiðari á Virkisráðgevingini í Saltangará.

# Smidligari karmar á arbeiðsmarknaðinum

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Kvalifiserað arbeiðsmegi er altíð eitt aktiv í einum samfelag. Tí mugu vit eisini gera smidligari karmar fyri útlendska arbeiðsmegi í Føroyum, soleiðis at fólk kunnu koma og fara, sum brúk er fyri teimum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum

- Vit mugu tryggja vinnuni kappingarførar karmar við eitt nú hóskiligari vinnulóggávu, skattalóggávu og avgjaldslóggávu, soleiðis at vit eru kappingarførir mótvegis teimum, vit kappast ímóti.

Soleiðis segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, við Sosialin í gjár.

Landsstýrið arbeiðir í løtuni við at gera tað lættari hjá føroyskum vinnulívi at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroya, har tørvur eru á fólki.

- Eg haldi, at vit eiga at gera karmarnar smidligari, soleiðis vit kunnu fáa útlendska arbeiðsmegi higar, tá ið brúk er fyri tí – og ikki minst; at hesi so í eini neyvari skipan fara avstað aftur, tá ið tíðarskeiðið er lokið.

Landsstýrismaðurin heldur, at føroyskt vinnulív eigur at fáa møguleikan at gera avtalur við útlendska arbeiðsmegi undir somu korum og treytum, sum føroyskir løntakarar hava.

- Kvalifiserað arbeiðsmegi er altíð eitt aktiv í einum samfelag. Tí mugu vit eisini gera smidligari karmar fyri útlendska arbeiðsmegi í Føroyum, soleiðis at fólk kunnu koma og fara, sum brúk er fyri teimum, sigur Bjarni Djurholm.

Hann sigur, at vit eiga at halda generella útlendingapolitikkin uttanfyri hesi viðurskifti, tí tað er eitt heilt annað mál, sum hann tekur til.

- Tá ið ræður um arbeiðsmarknaðin, eiga karmarnir at gerast smidligari, og hetta kann eisini vera við til at uppihalda nógvum arbeiðsplássum í Føroyum.

Bjarni Djurholm vísir á, at útlendingar, sum kanska av ymiskum orsøkum kundu ynskt sær at verið longri í Føroyum, enn brúk er fyri teimum á arbeiðsmarknaðinum, koma tá undir tær treytir, sum annars eru galdandi á økinum.

Og tá tosa vit um heilt onnur viðurskifti, leggur hann aftrat.

- Tað, sum landsstýrið ætlar við at gera viðurskiftini smidligari, er at geva vinnuni bestu fyritreytirnar fyri arbeiðsorku og menning, sigur landsstýrismaðurin.